# Argjabúðin snarað lyklinum

**Argjabúðin hevur nú snarað lyklinum fyri seinastu ferð. Í øllum førum undir heitinum Argjabúðin. Nýggir eigarar fara at taka við í næstum, og er nú hesin gamli handilin farin úr familjuhondum**

HANDILSLÍV
*Ingrid Bjarnastein*

Seinastu árini hava Olga og Dánjal Arge rikið handilin. Tey hava leigað hann frá Rigmor og Hans Jacob Sigvardsen. Men nú er handilin latin aftur, og um stutta tíð letur hann uppaftur í nýggjum hami.

– Abbi og pápi mín hava rikið handilin undan mær, sigur Rigmor Sigvardsen.

– Men nú er tíðin komin at gevast. At handilin fer úr familjuni er ikki nakað eg beinleiðis leggi so nógv í nú ein er vorðin eldri, og tað er eisini strævið.

Fyri nøkrum árum síðani lat Argjabúðin eina deild upp longri heimi, Garðsbúðina. Garðsbúðin hevur eisini latið aftur nú, og eisini hon er seld. Nú er alt tikið úr handlinum og málað verður og gjørt í stand.



*Argjabúðin hevur nú latið aftur eftir fleiri mansaldrar í familjuni*

Mynd: Jens Kristian


*Garðsbúðin, sum er ein deild av Argjabúðini, hevur somuleiðis latið aftur.*
Mynd: Jens Kristian

# Brandur bíðar í mánalýsinum

**Fløgan hjá Brandi Enni, Waiting in the Moonlight, kom út í gjár. Á fløguni eru 13 løg, har talan er um reinan, melidiøsan popptónleik**

ÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*

Nú er hon endiliga komin. Tann nógv umtalaða fløgan hjá tólv ára gamla Brandur Enni. Tey, sum hava bíðað eftir henni, kunnu fegnast um léttan popptónleik av besta slag.

Sjálvt um hann bert er tólv ára gamal, so hevur hann saman við Studio Pegasus í Klaksvík og nógvum øðrum góðum og kendum føroyskum tónleikarum, verið við í helst størstu fløguverkætlan í Føroyum nakrantíð. Talan er um eina íløgu uppá fleiri hundraðtúsund krónur.

Í sambandi við fløguútgávuna skuldi vera konsert í Norðurlandahúsinum í gjárkvøldið. Við á konsertini skuldi millum annað Eyðun Nolsøe luttaka, og eisini varð lovað fyri einum serligum Grand Prix dámi á, tá Pætur og Tóra við Keldu skuldu koma á pallin. Eisini var høvi at síggja eitt nýtt sjónbandalag, sum er gjørt til ein av sangunum. Meira verður um konsertina í blaðnum týsdagin, og hvør veit? Kanska Føroyar hava fingið eitt popp-idol.



*Nýggja fløgan hjá Brandur Enni kom út í gjár. Hon eitur Waiting in the Moonlight*



# Fullveldismenn misnýta Stoltenberg

**Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi boðaði í tíðindaskrivi herfyri frá, at kendi norski politikarin, Thorvald Stoltenberg, skal arbeiða fyri bólkin við málum, sum snúgva seg um viðurskiftini millum Danmark, Føroyar og Grønland. Sjálvur kennir Thorvald Stoltenberg als einki til nakra slíka avtalu**

POLITIKKUR
*Edvard Joensen*

Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi sigur seg hava avtalað við Thorvald Stoltenberg, at hann skal gera ávísar politiskar uppgávur fyri bólkin. Thorvald Stoltenberg sigur sjálvur, at tað passar ikki. Hann hevur onga sum helst avtalu gjørt við bólkin.

Í tíðindaskrivi tann 11. mars sigur Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi undir yvirskriftini »Thorvald Stoltenberg skal arbeiða fyri Norðuratlantsbólkin«, at Stoltenberg hevur váttað, at hann vil vera við í kanningum, sum skulu lýsa..... » *hernaðarliga virksemið í Grønlandi og Føroyum saman við búskaparligu fylgjunum av herstøðunum, eins og at lýsa fólkarættarligu støðu og rættindi Føroya og Grønlands, at lýsa sosialu viðurskiftini hjá grønlendingum í Danmark og at kanna møguleikarnar fyri bøttum ferðsluviðurskiftum í Norðuratlantshavi«.*

Seinni í tíðindaskrivinum verður sagt, at Norðuratlantsbólkurin fegnast um, at ... *»Thorvald Stoltenberg vil nýta sínar drúgvu royndir og stóru vitan í arbeiðinum at lýsa hernaðarmál í Føroyum og Grønlandi.«*

Sakin er bara tann, at tað vil Thorvald Stoltenberg yvirhøvur ikki.

### Ongantíð upp á tal

Thorvald Stoltenberg sigur í samrøðu við Sosialin, at tað hevur als ongantíð verið upp á tal, at hann skal lýsa nakra hernaðarliga støðu hjá Føroyum ella Grønlandi. Hann fer undir ongum umstøðum at blanda seg upp í nakað, sum hevur við støðuna millum Danmark, Føroyar og Grønland at gera, sigur hann.

– Tað er rætt, at eg havi tosað við grønlendska fólkatingsmannin Lars Emil Johansen. Hann ringdi til mín og spurdi, um eg kundi ráðgeva honum í ávísum uttanríkispolitiskum máli, og tað játtaði eg, greiðir Thorvald Stoltenber frá.

Stutt eftir gjørdist hann greiður yvir, at Norðuratlantsbólkurin hevði útnevnt hann at arbeiða við hernaðarmálum í útnorði. Tá gjørdi hann skjótt av og boðaði Lars Emil Johansen frá, at hann als ikki vildi vera við í nøkrum slíkum.

– Eg fari ikki at leggja meg út í politisk mál, sum viðvíkja danska kongaríkinum, sigur hann. Og Føroyar vóru als ikki upp á tal yvirhøvur, tá hann tosaði við Lars Emil Johansen.

### Diplomatur

Thorvald Stoltenberg er diplomatur og orðar seg varliga. Hann metir, at hann er misskiltur, tá hann hevur tosað við Lars Emil Johansen, og tað er hann harmur um.

– Jeg beklager att ha bidratt til en slik misforståelse, og trakk meg totalt med det samme, sigur Thorvald Stoltenberg við Sosialin.

Hann sigur seg hava góð viðurskifti við Danmark, eins og hann kennir nógv fólk í Útnorði eisini, sigur hann, og letur heilsa øllum vinum sínum í Føroyum, at hann hevur tað gott.

Vit royndu fyrrapartin í gjár at fáa viðmerking frá Norðuratlantsbólkinum til tað, sum Thorvald Stoltenberg nú førir fram.

Sjúrður Skaale, skrivari hjá bólkinum, var kvikur at vísa til Lars Emil Johansen, tá nevnt varð, at vit vildu vita, hvussu tað gekk við arbeiðinum hjá Stoltenberg.

Av skrivstovuni hjá Lars Emil Johansen varð sagt, at hann var upptikin á tingfundi, men lovað varð, at hann skuldi seta seg í samband við Sosialin, beinanveg, hann var leysur aftur.

Einki var frætt frá honum, áðrenn blaðið fór til prentingar.


*Thorvald Stoltenberg hevur ongantíð játtað at vera við í nøkrum arbeiði fyri Norðuratlantsbólkin á Fólkatingi, sum bólkurin annar boðiai frá í tíðindaskrivi í mars mánaða*

# Óhugsandi at arbeiða móti politiska viljanum

**Vil ein komandi samgonga hava broytingar í reglugerðini fyri Framtaksgrunnin, fara vit at arbeiða eftir tí. Men tann, sum keypir burtur av ognum hjá grunninum, má vita, hvar hann flýtur, áðrenn handlað verður, sigur nevndarformaðurin í Framtaksgrunninum**

FRAMTAKSPRÁT
*Edvard Joensen*

Nevndarformaðurin í Framtaksgrunninum, Niels Winther Poulsen, sigur, at tað er óhugsandi, at hann fer at arbeiða í móti politiska viljanum.

– Eg havi ongantíð arbeitt fyri nakran, sum ikki vil hava meg at arbeiða fyri seg. Kenni eg, at eg ikki eri ynsktur í starvinum, leggi eg frá mær, sigur hann.

Niels Winther Poulsen sigur, at tað má vera eitt krav, at ein møguligur keypari frá Framtaksgrunninum skal kunna kenna seg tryggan, tá hann handlar við grunnin.

Heilt greiðar linjur eiga at vera fyri, hvør kann keypa ognirnar hjá grunninum, sigur hann.


*Politiska skipanin er mín arbeiðsgevari, og henni fari eg at arbeiða eftir, sigur Niels Winther Poulsen, nevndarformaður í Framtaksgrunnninum*

Sum dømi nevnir hann, at eitt nú hevur verið ført fram, at tað er ikki so heppið, at útlendingar eiga føroyskt vinnulív.

– Vilja vit, at tað skal vera so, eiga vit at siga tað greitt, soleiðis, at møguligir útlendingar, sum eru áhugaðir í at keypa eitt nú Føroya Fiskavirking frá Framtaksgrunninum, vita, hvussu støðan er, so teir tora at taka eina avgerð uttan at skula óttast fyri, at hon verður broytt aftur nær sum helst.

### Tekur tíð

Tað tekur tíð at seta seg inn í viðurskiftini hjá Framtaksgrunninum, sigur Niels Winther Poulsen. Sjálvur metir hann, at hann skal hava minst ein mánaða ella so at kunna seg í.

Tað vil so aftur siga, at tað verða ongar stórar avgerðir tiknar soleiðis í óðum verkum, vísir hann á. Og at hann skal hava áhuga í at selja nakað burtur úr grunninum her og nú, er als ikki upp á tal, sigur hann.

Tað kemur heldur ikki upp á tal at selja nakað sum helst uttan bara fyri hægstbjóðandi.

Reglugerðin fyri Framtaksgrunnnin sigur, at seljast skal burtur av ognunum, tá tíðin er komin til tess. Men tað er ilt at siga, heldur nevndarformaðurin í grunninum, um tíðin er komin enn.

– Tað tekur tíð at finna út av tí, og ta tíðina havi eg enn ikki havt sum formaður, vísir hann á.

At hann skal brúka hesa stuttu tíð, sum eftir er av verandi valskeiði til at handla fyri ávísar kundar, er fullkomuliga burturvið, vísir hann á.

– Tað er óhugsandi, at nøkur søla verður framd nú. Tað eru vit heilt einfalt ikki klár til, sigur nevndarformaðurin.

Hann vísir á, at Føroya Fiskavirking virkar væl, og tað skal arbeiðast sera varisliga, um seljast skal burtur av Fiskavirking. Tað má til dømis alla tíðina hugsast um, at starvsfólkið ikki verður órógvað óneyðugt, og at tey vita, hvat hendir, sigur hann.

Tað er eisini umráðandi at vita, sigur hann, um politikararnir ynskja at selja Føroya Fiskavirking í smáum ella sum eina heild.

### Gegnið

Niels Winther Poulsen ásannar, at tað kann gerast ein gegnistrupulleiki at sita sum nevndarformaður í Framtaksgrunnninum og samstundis hava kundar, sum kunnu gerast áhugaðir partar í møguligum keypi frá grunninum.

– Men tann trupulleikin má so loysast, tá hann er har, sigur hann. Tað vil so siga, at hann má taka seg burtur úr øðrum partinum í teimum førum, tað kann gerast aktuelt.

Men hann metir tað sum eina sera spennandi uppgávu at vera vorðin formaður í Framtaksgrunninum, tí har eru nógv mál at loysa, sigur hann.

Niels Winther Poulsen sigur, at hann hevur ikki hugsað so nógv um, hvørt tíðarskeiðið nevndin situr, er ov stutt ella ikki. Men hann ásannar tó, at eitt ár er stutt tíð.

– Hinvegin, tekur hann aftur í aftur, verði eg ikki sitandi leingi, um eg kenni, at eg ikki eri ynsktur har.

Teir fýra nevndarlimirnir, sum landsstýrismaðurin við vinnumálum valdi, hava havt fund og skipað nevndina. Tó er fimti nevndarlimurin ikki valdur. Hann fara hinir fýra nevndarlimirnir at velja í næstu viku, sigur Niels Winther Poulsen, nevndarformaður i Framtaksgrunnninum.